# BRECHT NÚ Á F

**LEIKLIST** Sjónleikarbólkurin Grugg hevur fingið heimskendan týskan Brecht-tulkara hendanvegin at leikstjórna fyrstu uppsetingina av Berthold Brecht í Føroyum

Rigmor Dam

Hvat er størsta brotsverkið: at ræna ein banka ella at stovna ein banka?

Hetta kenda sitatið sigur alt um hugsjónina hjá heimskenda týska dramatikaranum Berthold Brecht. Og heitið á leikinum, sum leikbólkurin Grugg venur í hesum døgum, er "Goym moralin til seinni". Hetta endurspeglar eisini útgangsstøðið hjá týska dramatikaranum Berthold Brecht, sum í list síni fanst at ráðandi, borgarliga samfelagnum, sum eftir hansara tykki var ein dubultmoralsk og lívsfíggindalig skipan.

Í heitinum liggur ein ákæra móti elituni, sum hevur mettuna til at tosa um moral og annað fínt, meðan meirilutin hevur úr at gera við at fáa til vega mat í munnin.

## Ein sang-kollasja

Grugg er ein nýstovnaður yrkissjónleikabólkur, sum tær tríggjar Súsanna Tórgarð, Ria Tórgarð og Barbara Christophersen hava tikið stig til.

"Goym moralin til seinni" er fyrsta leikverkið hjá bólkinum, og er leikurin ein kollasja við 19 sangum eftir Berthold Brecht.

Flestu sangirnir í leikinum stava frá verkinum Dreigroschenoper, sum Kurt Weill skrivaði saman við Brecht í 1928. Verkið er skrivað fyri tað sum bleiv nevnt teatur við syngjandi leikarum. Stílurin í bæði samtalu og ljóði er fyrst og fremst samfelagssatiriskur. Í tónleikinum verður tað banala týdningarmiklasta listarliga útsøgnin, og verður verkið sum heild at meta sum episkt teatur, sum hevur agitatión sum høvuðsendamál.

Leikstjórin hevur funnið ymisk brot og sett tey saman til eina heild, sum snýr seg um evni, ið eru líka viðkomandi í dag, sum tey vóru tá Brecht skrivaði um tey fyri skjótt 100 árum síðani. Tey sum hava, og tey sum ikki hava. Hava vald, hava pengar. Hava frið og tryggleika. Og sjálvandi kærleika.

## Ein stór avbjóðing

At leikstjórna hevur bólkurin boðið eysturtýsku Sonja Kehler higar til lands í ein heilan mánað. Hendan Kehler er ikki hvør sum helst, men telist millum heimsins fremstu Brecht-tulkarar. Eisini er Kehler upphavskvinna til eina serliga metodu innan leiklist, sum er ein samanrenning millum kropp, rørslur og sang. Tað er hendan metodan, sum leikararnir í Grugg hava vant og lært seinastu vikurnar, og sum, eftir teirra tykki, hevur verið tað mest kravmikla og avbjóðandi í sambandi við uppsetingina av leikinum.

*rigmor@sosialurin.fo*







# Berthold Brecht

Eugen Berthold Friedrich Brecht (1898-1956) var ein týskur yrkjari, dramatikari, leikstjóri og leikhússtjóri. Hann gjørdist ein av týdningarmestu teaturmenniskjunum í 20. øld, og ávirkaði bæði dramaturgi og leikframleiðslu. Hetta seinna serliga ígjøgnum leikferðirnar við Berliner Ensemble, ið var leikbólkurin sum Brecht og sjónleikakvinnan Helene Weigel, kona og samstarvsfelagi hansara, vóru á odda fyri. Hesin bólkur fekk altjóða viðurkenning fyri sínar framleiðslur.

Tað mesta av lívi sínum var Brecht sannførdur marxistur, og arbeiddi við sjónleiki sum ein miðil fyri politiskar hugleiðingar og boðskapir. Hann er kendur fyri at hava ment tað "episka teatrið". Hansara hugsjón var at geva sjónleikinum nýggjan týdning sum eitt amboð.

Í episka teatrinum vildi Brecht, at áskoðarin ikki skuldi liva seg kensluliga inn í leikin, men heldur verða eggjaður til kritiska reflektión. Í staðin fyri at vera ruraður inn í eina kensluliga uppliving, skuldi áskoðarin fara úr sjónleikarhúsinum uppvaktur, varugur við samfelagsligt órættvísi og til reiðar at arbeiða fyri at broyta tað.

At røkka hesum endamáli nýtti Brecht ymiskar hættir at minna áskoðaran á, at sjónleikurin er júst hetta; sjónleikur og ikki veruleiki. Soleiðis royndi hann at vísa á, at eisini veruleikin er tilgjørdur og tí broytiligur. Hetta nevndi Brecht "Verfremdungseffekt", og uppnáddi hetta eitt nú við at lata leikarar tosa beinleiðis við áskoðaran, við sangum sum brutu leikin av og við skeltum við frágreiðingum á.

Ávirkanin frá Brecht sæst í dag víða bæði í sjónleiki og filmi.



*Bertolt Brecht, (1898-1956), týskur dramatikari, lyrikari, prosaistur, bókmentateoretikari og instruktørur. Brecht telist millum fremstu høvundar Týsklands. Hann var sosialistur og í mongum førum rættiliga umstríddur vegna atfinningarsama hugburðin til ráðandi, borgarligu elituna*